# Námsfrøðiligur stuðul til dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu

Søkt verður eftir námsfrøðiligum stuðli til dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu at byrja aftan á summarfrítíðina í 2018. Starvið er á 20 tímar um vikuna og er tíðaravmarkað til 31. desember 2018.
Tann setti kemur at vera um barn við serligum tørvi.

**Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit dent á:**
- trivnaðin hjá børnum og starvsfólkum
- at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur
- at vit eru ein grønur stovnur

**Vit ynskja:**
- at tú hevur áræði at geva børnunum avbjóðingar í gerandisdegnum, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- at tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú ert ágrýtin, jalig/-ur og nýhugsandi
- at tú ert við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiðið

**Lønarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu, sum er umfatað av stovnunum Gjáarlon og Látipípuni.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á tlf. 770 134.

**Skrivlig umsókn**
við avritum av prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 28. juni 2018 kl. 12 og sendast til:

**Vestmanna Kommunu**
**Bakkavegur 8**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**

**ella til vestmanna@vestmanna.fo**

---

Dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu er umfatað av stovnunum Gjáarlon og Látipípuni.

Í Gjáarlon eru vøggustovur og barnagarðsstovur og í Látipípuni er útibarnagarður og frítíðarstova.

Stovnarnir eru grønir stovnar, har ið dentur verður lagdur á at fara væl um umhvørvið – inni sum úti. Stovnarnir hava góðar umstøður – bæði innan- og uttandurða.